NØVN Í VIKUNI

Føroyingur prestur í Sæby

Marjun A Lómaklett er klaksvíkingur. Hon er fødd í Korea, men varð sum tvey ára gomul ættleidd til Føroya.

26 ára gamla Marjun A. Lómaklett er sett sum prestur í Sæby kirkju í Norðurjútlandi. Marjun var vald út millum 14 umsøkjarar og hon var eisini hildin at vera best egnaða av teimum fýra, sum royndarprædikaðu.

Og Marjun hevur verið dugnalig, síðan hon í 1994 fór til Danmarkar at lesa gudfrøði. Í fjør tók hon gudfrøðiligt prógv á Århus Universiteti og tey seinastu trý árini av lestrartíðini undirvísti hon eisini á universitetinum í kirkjusøgu. Meðan hon hevur lisið hevur hon eisini verið virkin í kirkjulívinum í Århus og í Skelager kirkju, har hon eisini var kirkjuráðslimur.

20. januar skal Marjun ordinerast í Aalborg av Søren Lodbjerg Hvass, biskupi. Hendan dagin verður skipað fyri bussferð úr Sæby til Aalborg fyri sóknarbørnini. »Vit vóna, at nógv koma við at síggja okkara nýggja prest verða ordineraðan, sigur kirkjuráðsformaðurin Jørgen Wirring við Nordjyske Stiftstidende.

27. januar verður hon innsett í embæti í Sæby Kirkju av Verner Tranholm Mikkelsen, dómprávsti.

Marjun er fyrsti setti kvinniligu prestur í Sæby. Hon varð millum jól og nýggjár gift Janus, sum er útbúgvin og arbeiðir sum flogmekanikari hjá Atlantic Airways. Tey eru flutt í prestsgarðin á Hans Abelsvej 19 í Sæby.

†

Kæra mamma mín

Elsebeth Ingvarda Andersen,
fødd Højgaard, ættað úr Rituvík,
búsitandi í Keypmannahavn,

andaðist sunnudagin 6. januar 2002, 88 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Samuelskirkjuni í Thorsgade 65 á Nørrebrúgv leygardagin 12. januar kl. 13.00.

Kirsten Greer

Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá kæri maður, pápi, abbi og verfaðir okkara

Kjartan Hansen,
* 20. januar 1923
† 24. desember 2001

doyði og varð jarðaður.

Takk tit, ið vóru um hann á landssjúkrahúsinum meðan hann var sjúkur og nú hann andaðist. Tøkk øll, sum vóru við, tá ið hann for av landssjúkrahúskapellinum og vestur í Miðvágs kirkju.

Tøkk til prestar, sangarar, berarar, kirkjutænarar og førara á bili. Tøkk øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað og tøkk til tey, sum hjálptu til vid borðhaldinum eftir jarðarferðina.

Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur
til Miðvágs kirkju.
Tøkk til øll, sum á ymiskan hátt
stuðlaðu okkum í sorgini.

Familjunnar vegna
Brynhild, Georg, Sofía, Jógvan og Heini

Skips Sosialurin
- TÍÐINDI TIL SJÓFÓLK

Nú er tað gjørligt hjá okkara sjófólki at fylgja við hvat hendir

Fá ein heilan Sosial sum e-mail, hvørja ferð hann kemur út.

Henda útgáva er gjørd á ein slíkan hátt, at hon fyllir minst møguligt og tískil skjót at heinta niður. Hetta er gjørt við at grafikkurin er tikin burtur, so einans teksturin er eftir og síðani pakkaður niður. Blaðið er sjálvútpakkandi á telduni og verður lisið við browsara, umframt at møguleiki er fyri at skriva alt blaðið út.

Útgávan er serliga ætlað okkara sjófólki, ið hevur atgongd til e-mail umborð á skipinum.

Stuðlað Skips Sosialin hevur

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag

Tiðindablaðið
Sosialurin BOX 76 110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Skips - Sosialinum og fái fyrsta mánaðin ókeypis

Navn á skipi:
Kontakt pers.:
e-mail:
Undirskrift:

Hava tygum spurningar í hesum sambandi ring 213982
ella e-mail: *skipssosialurin@sosialurin.fo*

☐ *Tekst útgáva*
☐ *HTML útgáva* (uttan útskrift)
☐ *HTML útgáva* (við útskrift)

Sosialurin

Prinsippmál

Avgerðin hjá Almannastovuni verður kærd

BARNAVERND
Turið Kjølbro

– Flyta vit hetta dømið til Havnar, ivist eg ikki í, at familjan í Havn hevði fingið fleiri tímar ráðgeving enn familjan á bygd, tí viðkomandi ikki hevur langan veg til arbeiðis, sigur barnaverndarlimur

Savnsmynd: Jens Kristian Vang

Málið um familjuna, ið fær minni stuðul, enn barnaverndin á staðnum, mælir til, er ikki endað enn. Allar avgerðir, Almannastovan tekur, kunnu kærast, og sum skilst fer barnaverndin í hesum førinum at kæra. Hon metir nevniliga ikki, at tað er rætt, at umbønin um tjúgu tímar stuðul til eina familju á staðnum, skal skerjast niður í ein triðing, tí koyring hjá familjuráðgeva verður drigin frá tillutaðu tímunum.

– Familjuráðgevar eru bara í Havn, eingin slíkur er úti á bygd, og tað sigur okkum so mikið, at familjur og børn á bygd og í Havn ikki eru líka fyri, um koyringin hjá viðkomandi er innroknað stuðlinum. Flyta vit hetta dømið til Havnar, ivist eg ikki í, at familjan í Havn hevði fingið fleiri tímar ráðgeving enn familjan á bygd, tí viðkomandi ikki hevur langan veg til arbeiðis, sigur barnaverndarlimurin, ið vil vera ónevndur.

Barnaverndarlimurin hevur ikki stórt álit á, at bygnaðarbroytingarnar, sum fara fram á Almannastovuni í løtuni, fara at gera samskiftið millum barnaverndir og stovnin betri.

– Vit kunnu vísa á mál, sum eru eldri enn eitt ár og sum framvegis eru til viðgerðar á Almannastovuni. Mannagongdin á Almannastovuni er soleiðis eftir øllum at døma, at málsviðgerðin ikki hevur heimild at taka nakra avgerð. Málini skulu ígjøgnum nógvar hendur, áðrenn ein avgerð verður tikin, og tað ger, at tíðin dregur út. Fyri okkum at síggja, sær ikki út til, at nøkur føst mannagongd er.

Fyrisitingarlógin ásetur eina fasta mannagongd viðvíkjandi samskifti millum stovn og brúkara.

– Senda vit eitt bræv, eina umsókn ella umbøn, eigur Almannastovan at melda aftur til okkara, tá ið stovnurin hevur fingið brævið, og siga frá, hvør málsviðgerðin er og hvat síðani hendir í málinum. Hetta verður als ikki fylgt og vit vita tískil ikki, hvat hendir í málinum og um nakað yvirhøvur hendir. Tí eru vit noydd at ringja og rykkja, og tað eru vit sera misnøgd við.

Gera ikki mismun á børnum

– Er talan um vanligar stuðulstímar til eitt barn ella eina familja, verður koyringin hjá tí, sum skal veita hendan stuðulin, ikki tikin frá tillutaðu tímunum frá Almannastovuni uttan mun til, hvar í Føroyum hesi búgva, sigur Petra Joensen, stjóri á Almannastovuni

BARNAVERND
Turið Kjølbro

– Skjót hjálp er umráðandi innan hetta barnaverndarøkið, og spurningurin er um galdandi mannagongd er ov tung, sigur Petra Joensen, stjóri á Almannastovuni

Almannastovan ger ikki mismun á børnum á bygd og í bý. Hetta sigur Petra Joensen, stjóri á Almannastovuni, í viðmerking til grein í Sosialinum í gjár. Har vístu vit á eitt ítøkiligt dømi, har ein familja á bygd fær sambært tilmæli frá barnaverndini á staðnum tillutað 20 tímar stuðul í heiminum, men tá ið samanumkemur skal koyringin hjá stuðlinum, sum býr í Havn, roknast frá tímunum. Teir tjúgu tímarnir minkaðu sostatt við einum triðingi. Barnaverndarlimurin, vit tosaðu við, vísti umframt á onnur ónøktandi viðurskifti í samskiftinum við Almannastovuna.

– Er talan um vanligar stuðulstímar til eitt barn ella eina familja, uttan mun til, hvar í Føroyum hesi búgva, skal koyringin hjá tí, sum skal veita hendan stuðulin, ikki takast frá tillutaðu tímunum frá Almannastovuni. Flutningurin millum heim og arbeiðsstað hjá stuðlinum kemur ikki arbeiðsgevaranum við, sigur Petra Joensen.

Við øðrum orðum eru tjúgu tímar stuðul veruliga tjúgu tímar. Er hinvegin talan um onnur tiltøk, Almannastovan setur í verk í einum heimi, broytist myndin. Stjórin á Almannastovuni kann sjálvsagt ikki fara inn í ítøkiliga dømið, vit hava víst á, men sigur kortini, at ymiskt kann henda í eini viðgerð, sum ger, at hjálpin, ið barnaverndin biður um, verður ein onnur enn upprunaliga ætlað. Eitt nú, um eingin søkir lýstu størvini.

– Nógv tiltøk kunnu játtast sambært grein 22 í lógini. Verður annað tiltak enn beinleiðis stuðul játtað, eitt nú familjuráðgeving, er støðan ein heilt onnur. Har verður í hvørjum einstøkum føri mett, hvussu nógv ráðgeving er neyðug, og í so máta eru øll líka fyri lógini.

Við øðrum orðum kunnu vit útleiða út frá hesum døminum, at ger Almannastovan av at veita eitt nú familjuráðgeving ístaðin fyri stuðul, verður tíðin ráðgevin brúkar til koyring til familjuna, ið skal hava hjálp, tikin frá.

Nógva staðni í Føroyum er eftir øllum at døma trupult at útvega stuðlar til børn og familjur, ið tørvar hjálp, hóast lýst verður væl og leingi í bløðunum. Serliga á smærri bygdum er hetta ein trupulleiki.

– Tað er týdningarmikið at gera stuðulsøkið meiri spennandi, soleiðis, at fleiri søkja størvini, sigur Petra Joensen.

Bygnaðarbroytingar

Barnaverndarlimurin, Sosialurin tosaði við í blaðnum í gjár, finnist at drúgvu avgreiðslutíðini á Almannastovuni. Frá tí ein barnavernd sendir eina umsókn til Almannastovuna um stuðul, gongur mangan upp ímóti einum ári, til umsóknin endaliga er avgreidd.

– Tað er sjálvsagt ikki rímiligt, at tað í føroum tekur so langa tíð. Skjót hjálp er umráðandi innan hetta økið, og spurningurin er um galdandi mannagongd er ov tung.

Bygnaðarbroytingar fara í løtuni fram á Almannastovuni, sum hava til endamáls eitt nú at gera samskiftið millum stovn og brúkara betri.

– Bygnaðurin er broyttur innan barnaverndarøkið, soleiðis at ein deild á stovninum burturav umsitur økið fyri alt landið. Hesar broytingarnar eru gjørdar fyri at menna barnaverndarøkið og vit miða ímóti, at barnaverndirnar fáa eina skjóta og góða viðgerð. Hinvegin skulu einstøku málini barnaverndirnar arbeiða við altíð lýsast væl áðrenn vit kunnu taka eina avgerð, og har eru fastar mannagongdir, sum barnaverndirnar fylgja, sigur Petra Joensen.

Leiðarin á nýggju deildini á Almannastovuni er Beinta Festirstein, løgfrøðingur. Hon tók við starvinum 1. jan.